




## Nýtt heim

Vegna serligar umstøður leita vit eftir einum nýggjum heimi til kettling okkara. Hon er av slagnum Birma.

**Vinarliga ring 505353 og hoyr nærri**




## Renault Laguna til sølu

Bilurin er frá desember 1998. Hevur fløguspælara og el-rútar. Bilurin er enskur, men er skrásettur í Føroyum og er góður at koyra.

Verður seldur **SERA BÍLIGA** vegna flyting.

**Áhugaði kunnu ringja á tel. 222081**

KIOSK ACTIV

## Starvsfólk søkist

Søkt verður eftir **VASKIFÓLKI** til Kiosk Activ í Hornabø og Kiosk Activ í J. Broncks gøtu at byrja skjótast gjørligt.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 73 37 40.

Søkt verður eisini eftir **KRAMBAFÓLKI** til Kiosk Activ í Hornabø, Kiosk Activ í J. Broncks gøtu og Kiosk Activ í Steinatúni at byrja skjótast gjørligt.

Nærri fæst at vita við at ringja á tlf. 73 37 41.

## Frítíðar / familju bátur til sølu

Riviera 925 - flybridge version, árg ´96.
10,25 m langur, 3,20 breiður, 90 cm dýpd.
Allar hentleikar - so sum kaffimaskina, køliskáp, kókiplátur, oljufýr, wc / brúsa, bóvskrúva, el akker, o.a.
8 sitipláss, 5 svovipláss - 2 kømur
motor: 1 volvo penta, kad300, 285 HK, árg ´06 - siglt 275 tímar
Báturin hevur skaða og kann síggjast eftir avtalu eins og á www.huseklepp.net.
nývirði 1.775.000 kr - marknaðarvirði ístandgjørdur ca. 1.200.000 kr.
**- selist fyri nøktandi boð.**

**Um áhugi, so ring 229654**

## Kappsigling á Skálafjørðinum

Um viðrar skipar Lions Club Eysturoy fyri árligu kappsiglingini fyri 4- og 5-mannafør á Skálafirði **sunnudagin 24. august 2008.**

Bátarnir fáa nummar, siglingarleið og -treytir útflýggjaðar í Heygsstøð á Strondum 1 tíma áðrenn siglt verður. Siglingin byrjar kl 15.

Bjargingarbelti skal vera til hvønn mann.

**Tilmeldingarfreistin er fríggjakvøldið 22. august kl. 20** til ein av niðanfyristandandi limum í siglingarnevndini:

**Regin Joensen,** Skipanes,
tlf. 441280 / 211280

**Sigvald Kristiansen,** Skála
tlf. 441517 / 288517

**Óli Zachariasen,** Gøtu
tlf. 441618 / 214742

LIONS CLUB EYSTUROY

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

# FUR
Føroya Ungdómsráð

## Skrivari til Føroya Ungdómsráð

Eitt starv sum skrivari til Føroya Ungdómsráð (FUR) er leyst at søkja til setan 1. oktobur 2008 - ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt skrivstovustarv, har tú kemur at samskipa dagliga virksemið hjá FUR og umsita alt samskifti við og frá FUR, bæði heima í Føroyum og við útheimin. Í samband við norðurlendskt samstarv og aðrar fundir, kemur tú eisini at verða við á ferðunum uttanlands. Harumframt kemur tú, í samband við ymiskar verkætlanir, at virka sum samskipari. Skrivarin hjá FUR hevur somuleiðis eisini ábyrgdina av bókhaldinum. Starvið er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum, sum skulu loysast í samstarvi við nevndina og limafeløgini.

FUR er er ein samstarvsfelagsskapur fyri teir skipaðu, sjálvbodnu og landsumfatandi barna- og ungdómsfelagsskapirnar í Føroyum.

**FUR hevur sum endamál:**
- at vera felagsumboð fyri limafelagsskapirnar,
- at viðgerða spurningar, ið viðvíkja føroyskum ungdómi,
- at skapa áhuga fyri ungdómsmálum,
- at eggja ungdóminum at taka lut í og fáa ávirkan á samfelagið,
- at umboða limafelagsskapirnar í samstarvi við myndugleikarnar,
- at menna samstarvið og sínámillum fatan millum føroyskan ungdóm,
- at menna millumtjóða fatan.

**Vit vænta av tær at tú:**
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt.
- Hevur góð samstarvsevni
- Hevur góð evni at orða teg greitt í skrift og talu á føroyskum, enskum og einum skandinaviskum máli.
- Hevur hóskandi útbúgving og/ella royndir innan skrivstovuarbeiði og bókhald. Hetta er tó ikki ein treyt.
- Ert ágrýtin og ungur í sinni

**Lønar- og setanartreytir:**
- Starvið verður sett sambært sáttmála samsvarandi við útbúgving ella eftir nærri avtalu.

Talan er um ¾ starv, dagarbeiði.

Umsóknarfreistin er til og við 15. septembur 2008

**Umsókn skal sendast til:**
Føroya Ungdómsráð
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Postsmoga 1359
110 Tórshavn

Hevur tú okkurt at spyrja hesum viðvíkjandi, kanst tú venda tær til Tjóðhild Patursson á telefon 593395, ella við at senda teldupost til fur@fur.fo

## Stongt vegna umvæling

Vegna umvæling verður ikki opið aftur fyrrenn 1. september 2008.

**Suðuroyar Norðari Sjúkrakassi**